

*- Her hava vit havnalag, trolvirki, frystigoymslu, og vit hava bæði hydraulisk verkstøð og verkstøð, sum fáast við el, eins og vit hava oljuterminal til tungolju sum tænastu til skipini, sigur borgarstjórin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Góðar íløgur í havnalag

**Sigurd Simonsen, borgarstjóri, sigur, at Fuglafjarðar kommuna hevur gjørt stórar íløgur í havnaløg, men hesar íløgur kasta eisini inntøkur av sær við havna-og brúgvagjøldum eins og við vørugjøldum.**

**Nú Effo Bunkers eisini hevur sínar veitingar á oljuterminalinum, hava stundum rættiliga stór skip verið á Fuglafirði og bunkrað.**

**– Longsta skipið, sum mær vitandi hevur verið her, var heilar 260 metrar langt, men hetta skipið var soleiðis bygt, at tað stakk ikki so ógvuliga djúpt.**

**Í august í fjør var stóra farmaskipið Caly Manx á Fuglafirði og bunkraði.**

**– Hetta skipið, sum var á veg úr Kanada við koli, sum skuldi flytast til Finlands, er 190 metrar langt og 32 metrar breitt.**

**Sigurd Simonsen sigur, at skipið hevði stívliga 50.000 tons av koli í lastini, og hann sigur seg vænta, at hetta er ein hin tyngsti farmur á nøkrum kjøli, sum hevur ligið við føroyskan bryggjukant.**

**– Oljubryggjan hjá okkum er hin djúpasta í Føroyum. Dýpið við bryggjuna er 14 metrar, men Caly Manx stakk út við 13 metrar, so her var ikki nógv at geva av, sigur borgarstjórin.**

*vilmund@sosialurin.fo*

svartkjaftakvoturnar smáar og muna lítið, men av royndum sigur hann, at svartkjaftur kann koma aftur – líka so knappliga, sum hann hvarv.

– Hetta hava vit sæð áður, leggur hann aftrat.

### Nógv fráfall

Men hví hevur borgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu so stóran áhuga í, at eitt matvøruvirki júst verður bygt í Fuglafirði?

– Tað er rætt, at eitt uppisjóvarvirki er eitt av mínum hjartamálum, eins og hetta eisini er eitt hjartamál hjá Fuglafjarðar kommunu. Uppisjóvarfiskur fer meiri og meiri til matna, og fáa vit ikki eitt matvøruvirki, fara tey skip, sum fiska hesi fiskasløg, at hava minni og minni at gera í Fuglafirði.

Sigurd Simonsen vísir á, at bæði vinnulívsfólk og kommuna hava bygt upp eitt týdningarmikið tænastuvirksemi til skip.

– Her hava vit havnaløg, trolvirki, frystigoymslu, og vit hava bæði hydraulisk verkstøð og verkstøð, sum fáast við el, eins og vit hava oljuterminal til tungolju sum tænastu til skipini.

Borgarstjórin heldur, at kunnu tey stóru uppisjóvarskipini ikki sleppa av við matfisk, verður lítið hjá teimum í framtíðini at gera á Fuglafirði. Tí hevur tað so ómetaliga stóran týdning, at vit fáa hetta matvøruvirki.

– Eg havi skilt á eitt nú norðmonnum, sum hava virkir, ið virka fløk úr uppisjóvarfiski, at fráfallið liggur um 50%, men tá samanum kemur er samlaða fráfallið helst eini 60%. Tað verður altíð ein partur av samlaðu nøgdunum, sum av ymiskum orsøkum ikki fara til matna.

Hetta vísir, heldur Sigurd Simonsen, hvussu stóran týdning tað kann hava fyri eitt ídnaðarvirki sum Havsbrún, at eitt matvøruvirki við slíkum fráfalli liggur í sama umhvørvi.

– Soleiðis, sum støðan er vorðin hjá Havsbrún, nú lutfalsliga fáar ídnaðarlandingar eru til virkið, noyðist Havsbrún at keypa stórar nøgdir av mjøl og lýsi úr útlandinum fyri at halda síni framleiðslu uppi. Hetta hevur so hinvegin givið kommununi øktar inntøkur í ymiskum gjøldum, nú farmaskip flyta hesar rávørur til Fuglafjarðar, sigur borgarstjórin.

*vilmund@sosialurin.fo*

**Kunnu tey stóru uppisjóvarskipini ikki sleppa av við matfisk, verður lítið hjá teimum í framtíðini at gera á Fuglafirði. Tí hevur tað so ómetaliga stóran týdning, at vit fáa hetta matvøruvirki**

SIGURD SIMONSEN

# 3,4 miljónir

Fuglafjarðar kommuna hevur í síni fíggjarætlan fyri 2011 sett út í kortið, at skattainntøkurnar hjá kommununi í miðal fara at liggja um 3,4 miljónir krónur um mánaðin í ár.

– Skattainntøkurnar fingu eitt ordiligt dýkk í januar og februar í ár, men knappliga setti mars mánaði met við umleið 4,2 miljónum krónum.

Sigurd Simonsen sigur, at mars soleiðis gjørdist besti skattamánaði hjá kommununi yvirhøvur.

– Fiskiflotin lá tíðliga í árinum, og hetta hevur ivaleyst havt sína ávirkan á inntøkurnar. Júst, hví mars mánaði gjørdist so góður, vita vit ikki við vissu, men vit kunnu hugsa okkum, at her eru onkrar samanteljingar komnar við, sum kanska hoyra til onkran av mánaðunum fyri, heldur borgarstjórin.

Sigurd Simonsen leggur aftrat, at í fjør hildu mettu skattainntøkurnar so at siga upp á krónuna.

– Nú vóna vit, at inntøkugrundarlagið í ár eisini fer at halda, leggur hann aftrat.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Ov lítil sleipikapasitetur

**Tá stór skip koma á Fuglafjørð, er ofta neyðugt við sleipikapasiteti, eins og neyðugt er við loðsi.**

**Báturin Pilot, sum verður rikin av fólki í Fuglafirði, er mangan ov lítil til sleip, men hann er góður, tá skipini ikki eru alt ov stór, og líkindini eru til vildar.**

**Sigurd Simonsen sigur, at neyðugt hevur ofta verið at boðsenda øðrum sleipibátum, eitt nú Alfa Pilot og onkrum av bátunum hjá skipasmiðjuni MEST, Skúmranum ella Pressaranum. Eisini hevur sleipibáturin Goliat hjá Thor okkurt skifti ligið á Fuglafirði.**

**- Vit høvdu ynskt okkum, at sleipikapasiturin var størri til tær størru og tyngru uppgávurnar, sigur hann.**

*vilmund@sosialurin.fo*